# Notat um elprísirnar til føroyskar ídnaðarfyritøkur v.m.

## Samandráttur


Føroysku elprísirnir hava týdning fyri kappingarførið hjá føroyskum fyritøkum, og er við til at avgera, í hvønn mun farið verður undir ymisk sløg av framleiðslu og meirvirking í Føroyum.

Ein nýggj samanbering av elprísunum í Føroyum og øðrum evropeiskum londum vísir, at føroysku elprísirnir fyri ídnaðarkundar eru teir hægstu í evropa, um talan er um eina vinnufyritøku við stórari elnýtslu. Fyri kundar við lítlari elnýtslu, eru føroysku elprísirnir millum teir hægstu í Evropa.

Gongdin í elprísunum síðani 2011 vísir, at kappingarførið er versnað við tað, at munurin millum elprísirnar í Føroyum og øðrum evropeiskum londum er øktur. Um samanborið verður við onnur fiskavøruframleiðandi lond sum Ísland, Noreg og Danmark, hevur gongdin verið serstakliga neilig fyri føroysku ídnaðarkundarnar, tí prísmunurin er nógv øktur seinastu árini.


## 1. Føroysku el-prísirnir týdning fyri kappingarførið hjá føroyskum vinnufyritøkum

Støðið á føroysku el-prísunum hava stóran týdning fyri kappingførið hjá føroyskum ídnaði og útflutningsfyritøkum sum heild. Eitt nú fiskaframleiðsla er ein vinna í harðari altjóða kapping, har marginalarnir eru litlir. Um ov stórur munur verður á elprísunum hjá føroyskum vinnufyritøkum og teimum hjá kappingarneytunum, kann hetta ávirka kappingarførið, og í hvønn mun fiskavørur verða meirvirkaðar í Føroyum ella um framleiðslan verður flutt aðrastaðni. Tess meira orkuintensiv ein framleiðsla er, tess meira kann ein høgur el-prísur skaða kappingarførið. Eitt nú er framleiðsla av klippfiski lutfalsliga orkuintensiv, eins og innfrysting av uppisjóvarfiski eisini krevur nógva orku.

Føroyskar vinnufyritøkur eru týðandi kundar hjá SEV, og keypa tilsamans uml. 2/3 av elframleiðsluni.

SEV hækkaði 1. januar 2020 elprísirnar við 10 oyru/kwt. Í hesum sambandi heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at spurningurin um kappingarførið hjá føroyskum vinnufyritøkum verður ov lítið viðgjørdur, tá avgerðir um príshækkingar verða tiknar. Føroya Arbeiðsgevarafelag samanber tí i hesum notati føroyska elprísin hjá ídnaðarvinnum við elprísirnar í øðrum londum í Evropa, og serliga teimum londum, sum føroyskar fyritøkur kappast mest við.

Endamálið við samanberingini er tí serliga at kanna hvussu kappingarførur føroyski elprísurin er, og hvussu kappingarførið er broytt seinnu árini. Orsøkin til gongdina er ikki kannað nærri.

## 2. Grundarlag fyri samanbering av elprísunum

Sum grundarlag fyri samanberingina eru nýtt hagtøl fyri evropeiskar elprísir í dátugrunninum hjá Eurostat, sum eru samanborin við prísskránna hjá SEV. Eurostat ger upp miðal elprísirnar í ymiskum londum í mun til el-nýtsluna. Til hesa samanbering eru nýttir prísir pr. kwt (uttan MVG og onnur refunderbar avgjøld) fyri fýra ymiskar nýtslur:

- 20.000-70.000 MWt – Føroyskar framleiðslufyritøkur við størstu elnýtsluni
- 2.000-20.000 MWt – Føroyskar framleiðslufyritøkur við stórari el-nýtslu

- 500-2.000 MWt – Føroyskar framleiðslufyritøkur við miðal elnýtslu
- 20-500 MWt – Føroyskar framleiðslufyritøkur við avmarkaðari el-nýtslu, t.d. smærri flakavirki, KT-fyritøkur og smærri ídnaðarfyritøkur

Nýggjastu tølini hjá Eurostat eru fyri fyrra hálvár 2019, og er prísskráin hjá SEV fyri sama tíðarskeið brúkt sum samanbering. Tó er føroyski elprísurin pr. 1. januar 2020 eisini tikin við í samanberingina. Hóast tað ikki er vist, at prísurin í øðrum evropeiskum londum verður tann sami í fyrra hálvári 2020 sum fyrra hálvár 2019, hevur prísurin í evropa tó verið so mikið støðugur, at tað ikki er misvísandi at taka hann við í samanberingina. Fyrivarni má tó takast fyri, at vit ikki kenna elprísin fyri fyrra hálvár 2020 í øðrum evropeiskum londum enn.

Í prísskránni hjá SEV er umframt nýtslugjaldið eisini ein fastur prísur fyri ídnaðarfyritøkur, sama hvat nýtslan er. Hædd er tikin fyri fyri hesum fasta gjaldi við at innrokna tað í elprísin. Tað er gjørt við at býta fasta gjaldið við miðaltalið fyri elnýtslu í hvørt av teimum fýra nýtsluflokkingunum omanfyri (ávíkavist 45.000 MWt í Bólki 1, 11.000 MWt í Bólki 2, 1.250 MWt í Bólki 3 og 240 MWt í Bólki 4). Sum samanberingargrundarlag er nýtt tillagaði elprísurin u/MVG.

Føroyski elprísurin verður samanborin við øll tey lond, sum rapportera prísir til Eurostat. Harumframt verður gongdin í elprísinum lýst við at samanbera gondini í Føroyum við gongdina í Íslandi, Noregi, Danmark, og miðal fyri 28 limalondini í ES. Fyrivarni verður tikið fyri, at íslendska tíðarserian er heldur stutt, men hinvegin eru nýggjastu tølini tøk. Tíverri eru íslendsku tølini fyri nýtslubólklin við størstu elnýtsluni ikki almenn.

Endamálið við notatinum er at samanbera føroyska elprísin til ídnaðarfyritøkur við elprísin í øðrum londum, og at lýsa gongdina í elprísunum seinnu árini.

Hvør orsøkin er til munin í elprísinum, og til gongdina í elprísinum seinastu árini, verður ikki viðgjørt í hesum notati. Orsøkin til prísmunir kunnu bæði verða effektivitetsmunir í framleiðslu, náttúrugivnar fyritreytir í einstøku londunum, hvussu elmarknaðurin er skipaður, umframt almennur stuðul og/ella avgjøld.

## 3. Úrslit

### 3.1. Elprísurin í Føroyum í mun til onnur evropeisk lond

- **Bólkur 1: 20.000-70.000 MWt**

Í hesari nýtsluflokkingini eru tyngstu føroysku vinnuligi elbrúkararnir, sum hava eina nýtslu omanfyri 20 GWt um árið. Í Føroyum er talan er um fá vinnuvirki í hesum flokki. Samanberingin vísir, at Føroyar eisini áðrenn hækkingina pr. 1. januar 2020 hevði hægsta elprísin í Evropa, og aftaná 1. januar greitt hevur hægsta elprísin fyri hesar størstu elbrúkararnar, um roknað verður við einum stabilum elprísi í øðrum evropeiskum londum.



Um samanborið verður við nøkur av teimum londum vit kappast mest við sæst, at føroyski elprísurin fyri tað fyrsta er munandi hægri samanborið við grannalondini, og fyri tað næsta er prísmunurin vaksandi. Tíverri eru eingin almenn tøl fyri íslendska elprísin í nýtsluflokkingini fyri størstu elbrúkararnar.



- **Bólkur 2: 2.000-20.000 MWt**

Eisini í tí næststørsta nýtslubólkinum, sum fevnur um nýtslu á 2-20 GWt, eru føroysku ídnaðarprísirnir teir hægstu í Evropa, og aftaná príshækkingina 1. januar klárt teir hægstu. Í mun til aðrar fiskavøruframleiðandi tjóðir s.s. Noreg, Ísland og Danmark, eru føroysku el-prísirnir 2-4 ferðir so høgir sum í hesum londum.



Um hugt verður eftir prísgongdini í hesum nýtslubólkinum sæst eisini, at kappingarførið hjá føroyskum fyritøkum á hesum øki er versnað síðani 2011, og munurin á elprísinum millum Føroyar og kappingarneytarnar tykist bara økjast.



- **500-2.000 MWt**

Fyri miðalstórar brúkarar skulu føroyskar vinnufyritøkur gjalda millum teir hægstu prísirnar í Evropa, tó at føroysku elprísirnir ikki vóru teir allarhægstu í fyrra hálvári 2019. Aftaná príshækkingina 1. januar 2020, verður føroyski elprísurin tó hægst, um ikki hini londini í ovasta prísbólkinum hækka sínar prísir líka nógv, sum SEV hevur gjørt.



Eisini í hesum nýtslubólki hevur gongdin verið tann, at munurin millum føroyska el-prísin og tann hjá kappingarneytunum hevur verið vaksandi. Har sum eitt nú danski og norski el-prísurin í hesum nýtslubólki er fallin í mun til 2011, er føroyski elprísurin hækkaður, til skaða fyri føroyska kappingarførið.



- **20-500 MW**

Um hugt verður eftir ídnaðarvirkjum v.m. við lágari elnýtslu sæst, at føroyski elprísurin til ídnað er høgur samanborið við flest onnur lond í Evropa, men í hesum nýtslubólki er hann ikki hægst. Í fyrra hálvári 2019 var elprísurin hægri í fýra øðrum evropeiskum londum. Við príshækkingini 1. januar 2020 má tó roknast við, at støðan er versnað. Hetta ber tó ikki til at staðfesta endaliga, fyrr enn evropeisku tølini fyri fyrra hálvár 2020 eru tøk.



Um hugt verður eftir gongdini í elprísinum fyri henda nýtsluflokkin sæst, at elprísurin í Føroyum í 2011 var lægri enn miðal elprísurin í ES. Har var eisini minni munur á elprísinum í Føroyum og hjá størstu kappingarneytunum í Noregi og Danmark. Síðani 2011 er munur tó vaksin nógv, so føroyski elprísurin í dag er hægri enn miðal í ES og munandi hægri enn hjá okkara kappingarneytum. So eisini fyri teir minstu elbrúkararnar hevur gongdin seinastu árini verið neilig í mun til kappingarførið.

